# Førdi politikkurin fer at føra til harðari lønarkrøv

**Eftir skattlættanum, sum ætlanin er at seta í verk, verða tað framvegis lág- og miðalinntøkurnar, sum skulu bera tær tyngstu byrðarnar, segði Ingeborg Vinther á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í gjár**

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*



*Skattalættin er longu etin upp at brúkaragjøldum og tað fer ikki at føra til linari lønarkrøv, heldur tvørturímóti, segði Ingeborg Vinther á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag, sum er hetta vikuskiftið. Myndin er frá aðalfundinum í gjár*

– Lat tey, ið orka best, bera tær tyngstu byrðarnar.

Hetta var ein boðskapur frá Ingeborg Vinther til Landsstýrið á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í gjár og í dag.

Í ársfrágreiðingini, sum hon legði fyri fundin fyrrapartin í gjár, fýltist hon á skattalættan, sum samgongan ætlaði at seta í verk.

Hon vísti á, at skattalættin ger ongan mun tí samstundis verða fleiri og fleiri brúkaragjøld løgd á fólk.

– Sostatt er skattalættin longu etin upp av øktum brúkaragjøldum. Og sostatt verða tað framvegis lág -og miðalinntøkurnar, sum koma at bera tær tyngstu byrðararnar, segði Ingeborg Vinther.

### Ger ikki krøvini linari

Ingeborg Vinther leggur dent á, at skattalættin, sum samgongan ætlar at seta í gildið, fer ikki at ávirka lønarkrøvini, sum fara at verða sett, nú samráðingarnar byrja um ein góðan mánað.

Í hvussu so er fer skattalættin ikki at gera krøvini linari.

Í ársfrágreiðingini segði hon at tvørturímóti fer tann førdi politikkurin at føra við sær, at tað verður enn meiri neyðugt at hækka lønirnar.

Hon vísti á, at politiska rákið gongur alt meira tann vegin,at almennar tænastur skulu einskiljast.

– Hetta verður gjørt í smáum fyri at brúkarin kanska ikki skal leggja tað so væl til merkis, men veruleikin er, at land okkara er við at gerast eitt samfelag við alsamt fleiri brúkaragjøldum.

Hon segði, at soleiðis er rákið eisini í grannalondum okkara.

– Men hendan gongdin kann als ikki brúkast í okkara samfelagi.Tvørturímóti skulu vit halda fast við eitt samhaldsfast samfelag,og tænasturnar, sum borgarar okkara skulu hava fyri at liva eitt gott lív, skulu vit øll gjalda. Heldur hetta rákið, sum nú hevur tikið seg upp, fram, syndrast tað samhaldsfasta samfelagið, ella tað sum er eftir av tí.

### Vita ikki hvat teir gera

Hon spurdi um politikararnir ikki vistu, hvat teir gjørdu, tá ið teir halda fast um, at skattalættin er so munagóður, at fakfeløgini skuldu halda aftur ella sleppa øllum lønarkrøvum.

– Fyrst á leggja teir okkum brúkaragjøld, sum frammanundan hava etið allan skattalætta upp og so verður afturhald kravt í lønarkrøvunum. So spurningurin er um teir vita, hvat teir gera.

Hon segði, at endamálið hjá politikarunum er fyrst og fremst at býta skattabyrðuna rættvíst so a tey ið orka best, bera tær tyngstu byrðarnar.

Hon veit væl, at skulu vit hava eitt samhaldsfast samfelag, er tað neyðugt at krevja skatt,

– Men tað nyttar lítið við skattalættum, tá ið skattaborgarin situr eftir við brúkaragjøldum í hópatali.

– Tá er lítið vunnið. Og eitt mugu bæði politikarar og arbeiðsgevarar gera sær greitt,og tað er, at ein skattalætti í staðin fyri eina lítla lønarhækking, ið verður tikin inn aftur við brúkaragjøldum, fer ikki at gera lønarkrøvini linari.

– Kanska fer tann førdi politikkurin tvørturímóti at herða lønarkrøvini, tí so hvørt, sum brúkaragjøld verða løgd á, verður neyðugt at hækka lønirnar. Tað er eyðsæð,og tað áttu landsins myndugleikar at skilt, sigur Ingeborg Vinther.

# Nú manglar bara loyvið

**Aðalfundur í Føroya Arbeiðarafelag**

*Áki Bertholdsen*

Nú fáa limirnir hjá Føroya Arbeiðarafelag eisini eina eftirlønarskipan.

Tað upplýsti Ingeborg Vinther, formaður í felagnum í ársfrágreiðingini, sum varð løgd fyri aðalfundin í gjáramorgunin.

Hon segði, at arbeiðið at fáa eina eftirlønarskipan fyri limirnar í Føroya Arbeiðarafelag er komið so væl áleiðis, at nú er bara eftir at loyvi til skipanina.

– Arbeiðið við at fáa hana til veruleika hevur tikið drúgva tíð, men nú er komið undir lang og Føroya Arbeiðarafelag fer helst sjálvt at umsita alla skipanina, segði Ingeborg Vinther.

Orsøkin til, at Føroya Arbeiðarafelag nú fer undir sína egnu eftirløn, er, at onki røkist fyri, at nøkur almenn skipan kemur, soleiðis, sum landsstýrið hevur lovað í fleiri ár.

– Samgongan hevurnú í áravís,tosað um eina lóg, ið skal tryggja øllum føroyingum rímiliga eftirløn. Men har er hvørki eitt ella annað hent, so hetta hevur bert verið tómt tos, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon vísti á, at lívstryggingin, ið Føroya Arbeiðarafelag gjørdi við Alka, hevur virkað væl,og samtykt varð á aðalfundi felagsins í fjør at víðka hesa trygging, so at hon eisini skuldi fevna um álvarsliga sjúk børn. Somuleiðis skuldi ein upphædd verða útgoldin í einum, tá ið fólk fylla 67 ár.

– Fleiri limir, ið hava lokið treytirnar fyri at fáa útgjald, tá ið tey fylla 67 ár, hava fingið hetta, eins og álvarsliga sjúkir limir,og tað er komið væl við hjá teimum.



*Nú fær eisini Føroya Arbeiðarafelag eina eftirlønarskipan fyri limir sínar, upplýsti Ingeborg Vinther á aðalfundinum í gjár*

Ingeborg Vinther fegnaðist um, at felagið hevur hesar tryggingar fyri limir sínar, men hon helt, at tað kundi verið vert at umhugsa at hækka lívstryggingarútgjaldið. Men tað kostar sjálvandi, legði hon afturat.



# Fara at standa sum ein maður hesaferð

**Lønarsamráðingarnar hjá arbeiðarafeløgunum hesaferð, verða søguligar, tí øll feløgini hava gjørt av at samráðast í felag**

LØNARSAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Sáttmálasamráðingar byrja í komandi mánað. Men samgongan ger samráðingarstøðuna hjá arbeiðarafeløgunum nógv verri enn hjá feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum og tað kann ikki góðtakast, sigur Ingeborg Vinther. Myndin er frá aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í gjár*

Nú er aftur tann stundin komin til handa, at arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar fara at samráðast um nýggjar sáttmálar.

Allir sáttmálar eru sagdir upp og til at fara úr gildi 30 apríl á midnátt, so tað verður um ein góðan mánað, at samráðingarnar byrja av álvara.

Men í ár verða samráðingarnar søguligar, tí hesaferð hava øll tey fimm arbeiðarafeløgini í landinum gjørt av at samráðast í felag.

Føroya Arbeiðarafelag, arbeiðsmanna- og arbeiðskvinnufelagið í Havn og somuleiðis tey bæði feløgini í Klaksvík, hava havt fund um málið og har varð samtykt at samráðast í felag.

Annars hava Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag verið saman ì teimum seinastu samráðingunum og Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hava samráðst fyri seg.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tað var Havnar Arbeiðsmannafelag sum tók stig til fundin ímillum arbeiðarafeløgini, sum var herfyri og tað var full semja í feløgunum um, at fóru tey saman til samráðingar, komu tey eisini at standa munandi sterkari, enn tey gera, tá ið tey samráðast í fleiri pørtum.

Feløgini fara at hava fund aftur seinni í hesum mánaðinum at gera upp, hvørji krøvini til tann nýggja sáttmálan skulu vera.

### Avgerandi spurningur ikki avgreiddur

Eitt, sum fleiri ferðir hevur forkomið møguleikunum hjá øllum arbeiðarafeløgunum at samráðast saman, er ósemja um, hvussu atkvøðurnar hjá hvørjum felag skulu vektast, tá ið støða skal takast til ein nýggjan sáttmála. Føroya Arbeiðarafelag hevur ikki viljað, at tey smáu feløgini skulu hava avgerðarrættin, tí so er vandi fyri, at tey kunnu koma at smoyggja ein sáttmála niðuryvir høvdið á Føroya Arbeiðarafelag, sum tað ikki vil góðtaka.

Og hinvegin hava tey smærri feløgini ikki vilja givið Føroya Arbeiðarafelag ov stórt vald í felags samráðingarnevndini, tí so kann tað enda við, at tað í roynd og veru verður Føroya Arbeiðarafelag, sum avgerð, hvønn sáttmála, fakfeløgini skulu góðtaka ella ikki.

– Tann spurningin hava feløgini als ikki tosað um enn, sigur Ingeborg Vinther.

Men hon leggur afturat, at ný feløgini hava gjørt av at samráðast í felag, kann hon ikki hugsa sær, at spurningurin um avgerðarrættin hjá hvørjum einstøkum felag skal forkoma ætlanini.

– Eg vóni at arbeiðarafjøldin fer at standa spjødd aftur hesaferð, soleiðis sum tey gjørdu undir seinastu samráðingum, tá ið feløg mótarbeiddu hvørjum øðrum.

– Í Føroya Arbeiðarafelag skulu vit so gera alt, ið stendur í okkara makt fyri at feløgini kunnu vera felags um samráðingarnar, sigur Ingeborg Vinther.

### Kann ikki góðtakast

Ingeborg Vinther sigur, at fyrrenn feløgini hava tosað saman, er ógjørligt at siga nakað um, hvørji krøvini verða.

Men hon ivast ikki í, at málið um karendsdagarnar fer at ávirka samráðingarnar

– Uppskot skal nú leggast fyri tingið um at løntakarin ikki skal hava sjúkradagpening teir báðar fyrstu sjúkradagarnar.

–Tað sigst at hetta uppskotið er galdandi fyri allar løntakarar. Men eftir starvsmannalógini hava at kalla øll tey fastløntu hjá tí almenna, rætt til løn frá arbeiðsgevaranum undir sjúku.

– Sostatt kemur ætlaða lógarbroytingin í veruleikanum bert at raka tey tímaløntu, sigur Ingeborg Vinther.

– Í lógaruppskotinum verður hon lagt upp til, at arbeiðsgevararnir skulu gjalda lønina fyri teir báðar fyrstu sjúkradagarnar.

– Alt gott at siga um tað. Men í samráðingunum, sum standa fyri durum, fara arbeiðsgevararnir sjálvandi at brúka hesa øktu lønarútreiðslu í eini roynd at avmarka lønarvøksturin hjá teimum tímaløntu.

– Hesin trupulleikin rakar ikki tey fakfeløg, sum umboða tey alment løntu,tí her verður eingin økt lønarútreiðsla.

– Lógin fer sostatt at gera, at samráðingarstøðan hjá feløgunum hjá teimum tímaløntu verður verri enn hon verður hjá feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

– Og tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

# Sjúka undir verkfalli gevur eisini rætt til sjúkradagpening

AÐALFUNDUR Í FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*

Verkafólk, sum liggja sjúk undir verkfalli, og sum tí ikki fáa stuðul frá úr verkfalskassunum hjá fakfeløgunum, hava rætt til sjúkradagpening.

Tað hevur Føroya rættur staðfest.

Í ársfrágreiðingini, sum varð løgd fyri aðalfundin hjá Føroya Arbeiðarafelag í gjár, vísti Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag á, at felagið hevði vunnið eitt sakarmál um sjúkradagpening í sambandi við seinasta verkfall.

Talan var um tveir løntakarar, sum løgdust sjúkir beint undan verkfallinum í 2001 og tí ikki kundi vera við í teimum tiltøkum, sum Føroya Arbeiðarafelag skipaði fyri.

Men Almannastovan vildi ikki lata teir fáa sjúkradagpening, tí hon helt ikki, at teir høvdu rætt til tað.

Fyri at fáa sjúkradagpening, skal talan vera um mista inntøku. Og tá ið løntakari er raktur av verkfalli, hevur hann ikki nakran inntøkumiss og sostatt kann hann heldur ikki fáa sjúkradagpening, segði Almannastovan

Avgerðin varð kærd til kærunevndina í almannamálum, men hon staðfesti avgerðina hjá Almannastovuni.

Men Føroya Arbeiðarafelag gavst ikki so og legði tí málið fyri Føroya Rætt og rætturin gav Føroya Arbeiðarafelag fult viðhald.

– Rætturin legði dent á,at tá ið løntakari vegna sjúku ikki fær tikið lut í teimum tiltøkum,sum fakfelagið skipar fyri undir verkfalli, og sostatt ikki kann fáa verkfalsstuðul, so er hetta at meta sum inntøkumissur. Og tí skal løntakarin eisini hava sjúkradagpening.